VIÐMERKINGAR

Eru tey 35 arbeiðsplássini í Suðuroy, ein stór sápubløðra?

Finnleif Guttesen

Halda teir, løgmaður, landsstýrismenn, løgtingsmenn valdir í Suðuroy og samgongan, suðuroyingar fyri tað turra spott?

Hetta eru viðkomandi spurningar, sum eru stillaðir áður. Menn tað sýnist, sum omanfyri standandi politikarar eru farnir undir heilt í hesum málinum.

Fleiri suðuroyingar spyrja seg sjálvan nú, um teir eru hildnir fyri gjøldur av teimum fólkavaldu løgtingsmonnunum, landsstýrismonnunum og løgmanni.

Flest allir suðuroyingar vóru fegnir táið teir hoyrdu um ætlanina, at byggja ellisheim í Vági, har brúk bleiv fyri 35 almennum arbeiðsplássum, tí arbeiðspláss er ein stór mangulvøra í Suðuroy.

Tað er væl ikki so galið, at samgongan dregur í land, tí ein kommuna, ikki treytaleyst tekur undir við uppskotinum?

Ella var framferðarháttur frá samgonguni við vilja so ófantaligur, at teir kendu svari, áðrenn fari var úr Tinganesi?

Frítíðarskúli til 2. flokk

Terji Nielsen
Valevni Fólkafloksins til býráðsvalið

Øll eru vit góð við børnini, og vit vilja, at tey skulu hava tað so gott sum møguligt. Í løtuni hevur Tórshavnar Kommuna einans tilboð um frítíðarskúla til børn, ið ganga í 1. flokki. Hetta merkir, at børn í 2. flokki, sum eru um 7 og 8 ára gomul, noyðast til húsa, táið tey fáa frí úr skúlanum um døgurðatíð.

Soleiðis sum samfelagið er innrættað í dag, er tað tíverri so, at hjá teimum allarflestu er neyðugt, at bæði foreldrini arbeiða úti. Hetta merkir, at børnini koma heim til eitt tómt hús, og neyvan verður nakar heima fyrr enn fleiri tímar seinni. Tað er tí vælskiljandi, at nógv foreldur eru bangin um síni børn, ið ganga heima einsamøll í fleiri tímar.

Í grannalondum okkara er tilboðið um frítíðarskúla oftast galdandi til og við 3. flokk, og tá eru børnini so mikið stór, at tey eru betur før fyri at klára seg sjálvan í nakrar tímar. Vit her í Havnar Kommunu noyðast at víðka um frítíðarskúlatilboðið, so at tað í minsta lagi er galdandi fyri 2. flokk eisini.

Fólkaflokkurin lovaði undan seinasta býráðsvalinum at loysa trupulleikan við barnaansing, og hesin trupulleiki er nú loystur. Nú ætla vit okkum at gera nakað við omanfyri nevnda trupulleika, og tí er tín atkvøða av týdningi fyri at tryggja teimum smáu skúlabørnunum ein tryggari gerandisdag.

Abort

Turið Debes Hentze

Nina Dahl er beinrakin vi sínum fáu og vælvaldu orðum við spurningi sínum um, hvat vit í Føroyum gera fyri tær einligu mammurnar og við seksualundirvísingina, síðani so sterkar kreftir eru í Føroyum, sum eru móti fosturtøku.

Eg skilji sjónarmiðið hjá teimum, sum eru móti abort við teirri grundgeving, at tað er at drepa lív, men seti samstundis spurning við, hvussu stór virðing teirra er fyri kvinnuni, sum er komin í ta ólukkuligu støðu at skula velja abort framum barnið

Mótstøðan móti abort verður í dag ofta grundgivin við, at lív skal ikki týnast, og at øll børn skulu vera vælkomin til hesa verðina. Um hetta var veruliga og einasta grundgevingin, so hevur høvi verið í øll hesi mongu ár frá 1956 til í dag at syrgja fyri sosialari og figgjarligari trygd fyri hesum mammum og børnum teirra. So er ikki. Kvinnur fara ikki bara til Danmarkar at fáa abort, einligar mammur rýma eisini í stórum tali av landinum til betri og tryggari figgjarlig viðurskifti í Danmark enn vit kunnu bjóða teimum. Føroyar eru ikki júst kendar fyri at veita stakum uppihaldarum tær bestu umstøðurnar

Sjálvt um vit ikki í dag tosa um leysingabørn og onnur ótespilig heitir fyri hesi børn og moður teirra, so beri eg bangheit fyri, at júst abortproblematikkurin er litaður av somu manglandi virðing og forstáilsi fyri hesum "óansvarligu" kvinnum. Tær eiga ikki at fáa abort, tí tær liggja sum tær hava reitt. Sjálvrættvísisrøddirnar eru mangar.

Ein fjald dagsskrá aftan fyri abortmótstøðuna er uttan iva royndin at stýra og kontrollera seksuala atburðinum – og her sjálvandi serliga kvinnum. Soleiðis hevur verið til allar tíðir. Menninir eru ikki so lættir at stýra tíverri. Men seksuellur atburður kann ikki stýrast við løggávu – heldur ikki við eini abortløggávu.

Óynskt børn verða hvønn dag gjørd, og abortir hava altíð verið gjørdar og fara eisini framyvir at vera gjørdar, líkamikið hvør løggávan er. Men við góðari seksual-upplýsing og við góðum útlitum fyri tryggum sosialum og figgjarligum viðurskiftum, so ber til at minka um talið av teimum, sum óynsktar vera við barn og talið av teimum, sum velja abort framum barnið.

Men eisini seksualupplýsingin er so sum so. Verður hon ikki hildin á einum ávísum lágum blussi, hoyrast skjótt mótmælandi røddirnar um ósiðiliga seksuallæru, sum bert elvir til seksuellan ólevnað, og sum er óneyðug, tí tú eigur at bíða við seksuellum krumspringum, til hjúnalagið er ein veruleiki. Og annars er hetta nakað sum foreldrini og ikki samfelagið eigur at taka sær av.

Hvussu ber tað til, at eitt samfelag sum lítið hevur at reypa av tá umræður seksualupplýsing og stuðuli til einligar forsyrgjarar, samstundis er tilreiðar at leggja stein oman á byrðu á tær kvinnur, sum eru komnar í ta støðu at skulu velja millum abort og at føða barnið. Eitt val sum í stóran mun verður ávirkað av tí umhvørvi, kvinnan livir í, og tí hon hevur at bjóða barninum. Í mínum hugaheimi kann hetta bera boð um, at vit venda teimum bakið, sum ikki liva upp til glastrimyndina av kjarnufamiljuni. Tær mugu liggja sum tær hava reitt.

Vónandi er tað ikki so, at tað eru somu fólk sum móti abort, sum eru móti seksualundirvísing. við grundgevingini at hesi ikki eiga at vera neyðug, tí seksuelt samlív millum kvinnu og mann byrjar ikki fyrrenn aftaná hjúnalag.

Stuðulin til hesar kvinnur gerst ikki við at fortelja teimum, hvat tær skulu gera ella at nokta teimum abort, men at stuðla teimum í teirra vali og virða teirra val, tí ábyrgdin tær taka er stór. Frí abort merkir at virða avgerðina hjá kvinnuni. Tað forðar ikki fyri og er eisini ynskiligt, at stuðulstiltøk vera sett í verk, sum kunna stuðla kvinnuni í hennara trupla vali, antin sum fastar mannagongdir ella sum tilboð til kvinnuna,

Stuðulin nýtist als ikki at verða knýttur at einum lækna ella einum presti, men avgerandi er, at hjálpin ikki hevur aðra dagsskrá enn at stuðla kvinnuni at taka tað fyri hana og barnið røttu avgerðina. Ein negativur, fordømandi, ella frammundan fastlæstur hug-burður um abort, ikki eitt gott útgangsstøði at hava, tá kvinnuni skal veitast hjálp til sjálvhjálp.

Tórshavn - ein miðdepil fyri íbirtarar og nýggjar vinnur

Annika Olsen,
Valevni Fólkafloksins til býráðsvalið

Fiskivinnan er í dag okkara høvuðsvinna, tann vinnan, ið gevur størstu figgjarligu inntøkuna í landskassan, men tað er ongin loyna, at neyðugt er við øðrum alternativum vinnum í Føroyum, sum kunnu geva landinum og kommunum inntøkur, fleiri arbeiðsplass og harvið betur vælferð í Føroyum. Sjálvt um vinnulívið fyri ein stóran part er ein landspolitisk uppgáva, er tað møguleiki fyri, at Havnin tekur fyrsta stigið til at stovnsseta fleiri vinnur. Fyri at fleiri vinnur kunnu setast á stovn, er tað neyðugt við gransking og íbirting. Fleiri partar av samfelagnum mugu tí samstarva fyri at lyfta ta uppgávu at fáa sett á stovn nýggjar vinnur og fyri at tryggja, at hesar yvirliva.

Svenskarar hava sett á stovn ein granskingarbý "Ideon", sum liggur tætt við tekniska háskúlan í Lund. Endamálið við hesum depli er at skapa møguleikar fyri, at tey sum hava góð vinnuhugskot, men ikki hava teir neyðugu førleikarnar, vitanina, figginginа o.a. kunnu fáa hjálp til at menna egnu fyritøku. Soleiðis kann samfelagið vera við til at skapa nýggjar vinnur m.a. innan KT, biotøkni, og hátøkni. "Ideon" er ein grunnur, ið er samansettur av fleiri þortum, ið hava eitt tætt samstarv um at menna og fíggja nýggjar vinnur. Grunnurin er samansettur av bankum, sum umboða fíggjar- og lánimøguleikar, granskingarskipanum við fólki við drúgvum granskingarroyndum og høgari ekspertvitan, vinnulívinum við praktiskum royndum og við íleggjarum í tær nýggju fyritøkurnar, umframt tí politiska myndugleikanum, sum stigtakari og fíggingarpartur til hesa verkætlan. Hesir partar kunnu í felag geva ráðgeving, fyrisitingarhjálp og bjóða fíggjarligar karmar til nýggj hugskot til fyritøkur, sum hava eitt stórt vinnuligt potentialið. Eitt frálíkt dømi, sum "Ideon" hevur verið við til at seta á stovn, er kenda fartelefonfyritøkan, Ericsson.

Á sama hátt kann Tórshavnar Býráð verða við til at stovnseta eina líknandi verkætlan - ein granskingar- og íbirtingarbý eins og "Ideon". Tórshavn hevur bankarnar / sparikassarnar, Fróðskaparsetrið / Granskingarráðið / Menningarstovuna / útbúgvingarstovnarnar, politikararnar / Løgtingið / miðfyrisitingina, akademikarnir / tey lærdu / tey mentaðu, Mentanina / tað kreativa umhvørvið og ikki minst núverandi vinnuna, sum kann veita ráðgeving og gerast íleggjarir til tær komandi íbirtingarfyritøkurnar.

Eg vil leggja mína orku í at arbeiða fyri, at Tórshavnar Býráð verður stigtakari til tann fóroyska íbirtingarbýin - sum vit kunnu nevna "Tór".

Tórshavn, býurin, við torir at ganga á odda.

VIÐMERKINGAR

Fleiri bátapláss

Birgir Sondon
Valevni á Lista E

Bátaeigarar í Havnini virka undir trongum korum. Tað er sum at vinna í eydnuspæli at fáa eitt bátapláss í høvuðsstaðarøkinum. Kanska ikki so løgið, tí bátatalið økist á hvørjum ári, og neyst eru ikki bygd í eitt mannaminni.

At hava ein bát er eitt gott og sunt frítíðarítriv. Og hjá teimum flestu er tað eisini til stóra gleði.

Bátafelagið í Havn hevur fleiri einn 600 limir og flestu teirra eru sera virknir. Býráðið eigur at stuðla, so felagið fær bestu umstøðurnar at virka undir.

Bátafelagið hevði eina frálíka ætlan inni á Sundi, men tá samgongan í býráðnum hevði havt verkætlanina um hendi, kendi bátafelagið ikki uppskotið aftur. Ein jarðbundin ætlan var vorðin til nakað nógv meira, har seglbátar og aðrir stuttleikabátar eisini skuldu vera við.

Neyðugt er at hava bæði beinini á jørðini og lurta verður eftir ynskjunum frá feløgunum.

Skynsaman fíggjarpolitikk - eisini komandi fýra árini

Eyðgunn Samuelsen,
býráðslimur

Eftir átta ár við eini fólkaflokksleiðslu í Klaksvík, har lítið og onki var gjørt við viðlíkahald av ognunum hjá kommununi, er sjálvsagt, at sitandi samgonga ikki hevur kunnað nøkta henda áralanga tørv hesi skjótt farnu 4 árini. Sitandi samgonga hevur raðfest at niðurgjalda skuldina og hartil hevur hon verið bundin av einum íloguloftí á áleið 20 mió árliga, ið landsstýrið álegði kommununum.

Støðan nú við árslok er tann, at skuldin er niðurgoldin til 64 mió, og íloguloftið er avtikið. Sostatt er Klaksvíkar Kommuna fíggjarliga nógv betur fyri enn hon hevur verið síðan síðst í 80'unum, tá skuldin, undir leiðslu av Fólkaflokkinum, var áleið 250 milliónir.

Skal Klaksvíkin verða ein nýmótans býur við góðum karmum til vinnuna, sjálvsøgdum rættindum til barnaansing og skúla og eini breiðari viftu av trivnaðar- og mentunnartilboðum til okkara borgarar, so verður ílogutervurin komandi 10 árini millum 300 og 400 milliónir krónur. Eru vit samd um, at hetta skal vera okkara mál fyri Klaksvíkina, er spurningurin bert, hvussu vit náa málið, væl at merkja, uttan at missa tamarhaldið og seta okkum í botnleysa skuld.

Tað eru 4 tættir, ið metast mugu um, tá ið vit seta út í kortið fyri at náa málinum: hvussu verða inntøkurnar komandi árini, á hvørjum støði skal raksturin liggja, hvussu verður gongdin í rentustøðinum og hvussu høgt seta vit skattaprosenti. Samanspælið millum hesar tættir er avgerðandi fyri hvussu ferð at hilnast.

Avgerðandi fyri inntøkumetingarnar komandi árini eru útlitini hjá okkara høvuðsvinnu og rentustøðið stendur og fellur við gongdini úti í heimi. Raksturin hjá kommununi er nógv øktur síðstu árini, tvær høvuðsorsøkir eru stóri lønarvøksturin og útbyggingin av barnaansingini. Tí ber ikki til bert at siga, í samband við ger av eini figgjarlóg, at vit skerja raksturin 1,2 ella 3 % komandi ár. Vit eiga altíð at spyrja okkum sjálvi, um raksturin av kommununi kann gerast betur og bíligari men hetta má gerast við at hyggja at, hvussu ein tænasta er skipað í dag og um til ber at skipað hana betur og bíligari og hetta gerst ikki eftir einum degi. At enda koma vit til skattaprosenti og harvið eisini hvussu stóra lánibyrðu vit ynskja at hava. Í grundini er tað ikki so áhugavert hvussu høgt skattaprosenti er ella hvussu nógv lán ið ein hevur. Tað ið er áhugavert, og sum borgarin eisini vil vita er, hvat gjalda vit skatt til? hvat læna vit til? hvussu verður peningurin umsitin og hvat fáa vit fyri hann? At brúka eina skatthækking sum eina ræðumynd í einum valstríðið er ikki eitt eyðkenni fyri ein seriøsan politikk.

Spurningurin fyri framman er, hvussu ynskir borgarin at útbyggingin av býnum skal fíggjast ? ynskja vit at gjalda ein part av íløgunum so hvørt sum tær vera gjørdar gjøgnum skattin t.d við eini øking á 1% ella vilja vit útseta afturgjaldingina til seinni við at læna peningin?

Javnaðarflokkurin í Klaksvíkar býráð vil arbeiða fyri:

- Skynsemi á fíggjarliga økinum
- Javnvág í raðfestingar av íløgum millum »harða« og »bleyta« pakkan
- Langtíðaríløguætlan samtykta av býráðnum.

Kór um ellisheim

Kári Árting
Valevni Tjóðveldisfloksins til býráðsvalið í Havn

Eg vil eisini sleppa at syngja við í kórinum, sum syngur um ellisheim.

Eitt av høvuðsevnunum til hetta býráðsvalið er tørvurin á ellis og røktarheimsplássum. Tað er í grundini ikki rætt at teingja hesi bæði saman, tí at vera gamal er als ikki tað sama sum at hava brúk fyri røkt. Hetta eru tvey ymisk ting, men tað verður ikki evið í hesum føri, og í báum førum er tørvurin ovurhondsstórur.

189 pláss væntaðu í stóð á breddanum á onkrari avís nú ein dagin. Veruligi tørvurin er uttan iva væl størri. Frísk fólk, sum kunnu hugsa sær ellisheimspláss gera ikki vart við seg, tí tað er eingin vón at fáa nakað pláss kortini.

Valevnini lova nógv og øll vilja øllum alt tað besta, serstakliga nú valið nærkast. Ringt kann vera at taka dagar ímillum, hvør hevur evnini at fáa tingini gjørd, og hvat er sápubløðrur.

Vit hava øll fatað, at ábyrgdin fyri eldrarøktini liggur hjá landstýrinum. Men ymiskt er hvussu tað hevur ligið fyri hjá ymsu komununum at loysa tørvin.

Í Tórshavnar komunu eru í skrivandi stund 10 pláss komin afturat í hesum valskeiðinum, og 16 koma afturat í næstum.

Í Eysturoynni og Norðurstreymoy vera tað um skamma stund 200 pláss til 10.000 fólk. Í Havnar kommunu vera um 150 pláss til 20.000 fólk. Neyðin sum stendist av hesum er eink minnið enn stór skomm fyri kommununa.

Komandi býráð má bretta um armar og fara til verka beinan vegin, so at vit eisini fáa ein bita av køkuni hjá landstýrinum. Í Kollafirði er frítt og fagurt økið sett av á Todnesi til endamálið og aðrastaðni finnast lika so góðir møguleikar.

Her er nógv at gera, men tá øll siga seg vilja loysa trupuleikan, man ein losyn eisini vera.

TING-HELLAN

TINGHELLU-VIÐMERKINGIN
Jóannes Eidesgaard, løgmaður
(Lesið eisini Tinghelluna inni í Vikuskiftinum)

Spunadoktarar og kunningarráðgevi

Seinastu árini hevur nógv verið tosað um politiskir spunadoktarar í londunum uttanum okkum - serliga í Danmark og Bretlandi. Og nógv hevur eisini verið gitt um hesi størv – at tey fevna um okkurt loyndarfult ella óetiskt.

Í Danmark eru nú reglur um at seta politisk embætisfólk verða útnevnd politiskt og fara úr starvi, tá politiska leiðslan fer frá.

Í Íslandi, har reglur um miðfyrisiting eru ásettar í lóg, hevur ráðharri heimild at seta í starv ráðgeva, sum fer úr starvi, tá ráðharrin fer.

Slík størv eru ikki vanligur partur av fyrisitingini, og tey kunnu ikki geva embætisfólkum boð. Formliga verða hesi størv ikki kallað spunadoktarar. Men orðið spunadoktari verður ofta nýtt um tey, serliga tá okkurt minni gott verður borið fram.

Kunningarráðgevin, ið skal setast í næstum, verður settur sum partur av fyrisitingini í Løgmansskrivstovuni. Starvið verður sett undir vanligum treytum, tó tíðaravmarkað, og viðkomandi skal halda seg til innanhýsis reglur og virðisgrundalagnum hjá stovninum.

Partur av virðisgrundarlagnum hjá Løgmansskrivstovuni er at starvsfólkið skal røkja uppgávurnar flokspolitiskt óheft, men við politiskum tevi og við atliti at fólkaræðisligum meginreglum.

Tað er stórur munur í millum arbeiðsuppgávurnr hjá einum politiskum ráðgeva og kunningarráðgevanum, sum verður settur á LMS.Kunningarráðgevin skal í høvuðsheitum taka sær av kunningarvirksemi hjá landsstýrinum. Hetta fevnir m.a. um at leggja til rættis kunning frá Løgmansskrivstovuni, vegleiða og/ella leggja til rættis kunning frá stjórnaráðunum, hava samband við fjølmiðlar og evna til uppskot til politikk og virkisætlan fyri almenna kunning bæði í Føroyum og út í heim. Viðkomandi skal eisini taka sær av ávísum ritarauppgávum so sum at útvega løgmanni áleikandi og viðkomandi tíðindi, rittstjørna røður og annað skrivligt tilfar og vera við til at fyrireika og samskipa vitjanir. Harumframt kunnu ávísar fyrisitingarligar uppgávur verða lagdar til kunningarráðgevan at avgreiða. Skipanarliga verður kunningarráðgevin partur av Ritaraeindini.